

ítróttur

Nr. 70 • hósdagur • 10. apríl 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Borgarstjórin í Vestmanna, Gunn Joensen:

-Vit vinna

GULLBRAKIÐ
Páll Holm Johannesen

So avgjørd var Gunn Joensen, borgarstjóri í Vestmanna kommunu, tá, vit spurdu hana, hvat hon væntaði úrslitið fer at vera leygardagin í Vestmanna. Sjálv fylgir hon væl við hondbóltinum í Vestmanna, og hon er sera spent til endabrakið leygardagin.

- Tað verður nógv tosað um hondbólt í bygdini nú um dagarnar, og fólk eru sera spent til dystin, sigur Gunn Joensen.

Sigur ein Vestmanna, so er eisini neyðugt at nevna VÍF, tí Vestmanna er hondbóltsbygd burturav og tey seinnu árini hevur VÍF verið einaráðandi hjá bæði kvinnum og monnum. Hóast úrslitini hjá VÍF í ár ikki hava verið eins góð og í fjør, so eru fólk kortini sera spent, og prátið í vikuni hevur ikki verið um annað enn hondbólt.

Borgarstjórin í Vestmanna kommunu, Gunn Joensen, er sera spent undan dystinum ímóti STÍF leygardagin, og hon væntar, at VÍF, dregur longsta stráið, og vinnur meistaraheitið í ár.

Borgarstjórin ásannar eisini, at hondbólturin hevur ótrúliga stóran týdning fyri trivnaðin í bygdini, bæði hjá teimum, ið íðka, og hjá teimum sum fylgja við.

- Fyri at tryggja ítróttini so góðar karmar sum gjørligt í Vestmanna, royna vit at geva ítróttini, hvat hallarleigu og viðlíkahaldi annars, so góð kor sum gjørligt, tí ítróttarfeløgini í Vestmanna gera eitt stórt arbeiði, greiðir Gunn Joensen frá.

Gunn vísur á, at Vestmanna ikki einans er ein hondbóltur, tí nógv íðka Badminton og rógva í Vestmanna, og tey gera eisini eitt megnar arbeiði

Tá, ið vit spyrja hana um kommunan hevur fyrireika nakað, um so verður, at VÍF vinnur meistaraheitið, sigur Gunn, at tað hava tey ikki. Hon vísur á, at vanliga er tað nevndin í VÍF, sum stendur fyri slíkum tiltøkum. Gunn leggur afturat, at vanliga verður ikki fyrireika nakað, áðrenn dysturin er leiktur, og tað verður tað heldur ikki í ár, sigur borgarstjórin í Vestmanna at enda.

HSF ivast

HEIÐURSMERKJAHANDAN
Páll Holm Johannesen

Undan seinasta umfarinum í landskappingini hjá monnum leygardagin, kunnu vit bara siga við vissu, at gullmerkini enda í Vestmanna. Hvar silvur- og bronsukrónurnar enda, er enn ógreitt. Vinna strandingar, og Kyndil samstundis vinnur grannauppgerðina ímóti Neistanum, so yvirhála Kyndil vestmenningar í stigatalvuni, og fáa silvurmerkini. Fer VÍF harafturímóti við sigrinum á STÍF, so vera bæði gull- og silvurheiðursmerkini í Vestmanna, meðan Kyndil fær bronsuna.

- Vit vita ikki reiðiliga, hvussu vit gera leygardagin hjá monnunum, tí har eru fleiri møguleikar. Ein møguleiki er at spæla dystin í Havn áðrenn tann í Vestmanna, men vit hava einki avgjørt enn, sigur Jógvan Martin Mørk fyri kappingarnevndina hjá HSF.

Hjá kvinnunum er alt longu avgreitt. VB fær gullkrónurnar í Runavík, meðan VÍF og STÍF fáa ávikavist silvur- og bronsuheiðursmerkini handaðið í Vestmanna.

Eivind Jacobsen:

Vóni, STÍF hevur ein góðan dag

Sjálvur verður borgarstjórin ikki í høllini í Vestmanna leygardagin, tí hann er á messu í Týsklandi. Kortini fer hann at lurta á internetinum.

GULLBRAKIÐ
Páll Holm Johannesen

Borgarstjórin í Sjóvar kommunu, Eivind Jacobsen, er sum verða man rættiliga spentur undan endabrestinum í landskappingini hjá monnum. Leygardagin verður tann stóra finalan, tá oddaliðini VÍF og STÍF bresta saman í Vestmanna.

Tíverri verður Eivind staddur í Týsklandi leygardagin, har hann í løtuni er á messu um máling

– Henda messan er bert annað hvørt ár, og tí eri eg noyddur at luttaka. Tað er stórt spell, nú stóra finalan verður í hondbóltinum, og mínir bygdamenn hava møguleika at vinna FM, greiðir Eivind Jacobsen frá.

Borgarstjórin fylgir annars vanliga væl við í hondbóltskappingini- bæði hjá kvinnum og monnum, og hann sigur seg vera sera spentan til dystin leygardagin. – Tá, eg ikki sjálvur kann vera til staðar, so farið eg at lurta á internetinum, sigur Eivind úr Týsklandi.

Spurdur um, hvønn týdning ítróttin hevur fyri Sjóvar kommunu, svarar Eivind, at hon hevur stóran týdning. Hann vísur á, at flest øll varða av STÍF, og at felagið hevur nógv at siga fyri trivnaðin í kommununi.

– Fyri tey ungu hevur tað nógv at siga at tað gongur væl hjá teimum eldru, tí tað eftir mínum tykki økir um áhugan hjá teimum ungu, fortelur Eivind Jacobsen.

Tað hevur gingið væl hjá teimum eldru í STÍF í ár, menninir hava møguleika at vinna FM, og kvinnurnar hava longu ognað sær bronsu-heiðursmerkini. Bygdirnar á vestara armi á Eysturoynni kunnu tí saktans vera væl nøgdar við hondbóltskappingarárið í ár.

Tá vit at enda royna at fáa borgarstjóran í sjóvar kommunu at tippa um úrslitið leygardagin, er Eivind Jacobsen eitt sindur í iva.

– Spælið hjá okkara monnum hevur verið nakað svingandi í ár, og tí er næstan ómøgulig at siga nakað um úrslitið. Spæla okkara menn optimalt, kann einki lið gera nakað við okkum, og heldur ikki royndu vestmenningarnir, og tað má verða mín vón, at vit hava ein góðan dag leygardagin, sigur Eivind Jacobsen at enda.

Eivind Jacobsen, borgarstjóri í Sjóvar kommunu, er á messu í Týsklandi leygardagin, og verður tí ikki í høllini í Vestmanna. Kortini fer hann at fylgja við á internetinum, hvussu leikur fer fram.